Alt skal snøggast

Hárfrí›kunarstovurnar kring landi› hava úr at gera í hesum døgum

JÁKUP MØRK

Hjá Tótu klippa tær vi› fullari fer›. Øll vilja rigga væl á ólavsøku, og tí skal hári› sjálvsagt eisini snøggast

Mynd: Jens Kr. Vang

Ta› er ikki frítt, at fólk gera seg til, nú ólavsøkan stendur fyri framman.

Føroysku klæ›ini ver›a rigga›i til, og hjá summum ræ›ur um at faa seinastu silvurlutirnar keyptar, ella kanska skal okkurt seymast ella leggjast út.

Hár skal til

Eisini á yrvirtromini gera fólk nógv burtur úr. Hárfrí›kunarstovurnar í høvu›ssta›num hava úr at gera. Ja, kanska meira, enn tær hava nakra a›ra tí› á árinum.

Tóta Sørensen, sum eigur og rekur Salon Tóta í mi›b‡num, sigur, at tær hava úr at gera fyri tí›ina. – Øll vilja ver›a snøgg á ólavsøku, og ta› er kanska bara á jólum, at vit hava líka nógv at gera, sigur hon.

Hon leggur afturat, at tá hon sigur øll, so meinar hon eisini vi› øll. Bæ›i børn, vaksin og eldri skulu skerast. Eisini heldur Tóta, at frítí›in ger sítt til, at so nógv er at gera nú, men hetta hevur hon sum so einki ímóti. – Vit vilja í øllum førum ikki vóna, at ta› ver›ur minni at gera komandi ólavsøkurnar, sigur hon smílandi.

Um hársni›i› til ólavsøkuna sigur hon, at ta› sum so er á lei› tí vanliga. – Flestu fólkini vilja bara síggja væl út, og ta› eru ikki so nógv, sum vilja gera naka› heilt serligt vi› hári›, solei›is sum ta› er vanligt til eitt nú føstulávint, sigur Tóta at enda, á›renn hon aftur fer í holt vi› næsta kundan.

Eisini uttan fyri Havnina

Ta› er tó ikki bara í høvu›ssta›num, at fólk gera seg til.

Hjá Salon Marjun í Klaksvík hava tær eisini úr at gera. Marjun Olsen, sum rekur hárfrí›kunarstovuna sigur vi› Sosialin, at tær so sanniliga eisini merkja, at ta› er ólavsøka: – Vanliga er tá somiki› nógv at gera, at tá ólavsøkan endiliga kemur, eri eg so mó›, at eg als ikki orki at fara til Havnar, sigur hon.

Eisini hon heldur, at summarfrítí›in ger sítt, og leggur so afturat, at ta› annars er serliga á Nor›oyastevnu, umframt á jólum, at ta› stendur á hjá teimum:

– Vit plaga tó at røkka øllum, sjálvt um ta› onkuntí› stendur á. Einasti trupulleikin er, um fólk koma í seinastu løtu, tí tá er ofta torført at sleppa framat, sigur Marjun at enda.

Músin ger um seg

Músaska›ar og ska›ar orsaka›ir av skeivum arbei›sumstø›um gera alt meira um seg, men í veruleikanum skal líti› til, fyri at fyribyrgja hesum

JÁKUP MØRK

Ein avlei›ing av telduinnrásini, sum nú hevur sta›i› vi› í eini 20 ár, er, at sonevndu músaska›arnir gerast alsamt fleiri í tali.

Ska›in brei›ir seg

Beinta Danielsen, sum hevur fysioterapistovuna Stimbur, sigur vi› Sosialin, at tey merkja væl, at títtleikin av hesum ska›um er øktur.

Hon sigur, at talan er um ein stóran bólk av fólkum, sum hava ska›ar, sum beinlei›is stava frá skeivum arbei›sumstø›um. Ska›ar, sum gera um seg í undirarmi, álboga, øksl og nakka.

Sonevndu músaska›arnir raka nevnliga slettis ikki bara álbogan, sum annars er tann likamsparturin, sum ver›ur oftast nevndur í hesum sambandi.

At byrja vi› eru ta› tó serliga álbogin og undirarmurin, sum taka ska›a av smá rørslunum vi› fingrunum, men so vi› og vi› brei›ist hetta, grei›ir Beinta frá: – Tá tú fært pínu í arminum av eini ávísari rørslu, roynir tú av tær sjálvum at n‡ta a›rar arbei›sstø›ur. Hesar eru kanska heldur ikki so rættar, og tí er tá vanligt, at ska›in flytur seg longur upp. Eitt nú til økslina og nakkan.

Sita ov nógv

Størsta orsøkin til hesar ska›ar, er fyrst og fremst skeivt arbei›sumhvørvi, sigur Beinta.

– Hetta eru ymsu arbei›splássini tó eisini vi› at síggja nú, og ta› er alsamt meira vanligt, at virki spyrja um rá›, tá skrivstovur skulu innrættast, sigur Beinta. Í hesum sambandi vísir hon á, at ta› ta› bara eru bor› og stólar, sum hava naka› at siga, men eisini ljós, armhvílur og anna›.

Hon leggur tó eitt sindur speiskliga afturat, at arbei›splássini heldur ikki skulu gerast ov væl innrætta›i. Ein annar stórur trupulleiki er nevnliga, at fólk sita alt ov leingi. Beinta vísir á, at um rætt var› atbori›, ´áttu skrivstovufólk at sta›i› uppi í einar 10 minuttir av hvørjum tíma, so kanska er ta› av tí gó›a, um fari› ver›ur eftir kaffikrússinum vi› jøvnum millumbilum.

Eisini vísir Beinta á, at í flestu førum, so sita fólk alt ov nógv: – Fert tú til og frá arbei›num í bili, situr ni›ri me›an tú ert til arbei›is, og so eisini setir teg í sofuna, tá tú kemur heim, so má okkurt henda vi› kroppinum, sigur Beinta. Hon leggur afturat, at bara ta› at ganga ein túr av og á, ella gera onkrar einfaldar rørslur nakrar fer›ir um dagin, ger stóran mun í so máta.

Skal fyribyrgjast

Beinta Danielsen leggur annars dent á, at ta› t‡dningarmesta í hesum sambandi er at fyribyrgja ska›unum. – Taka fólk rá›ini til eftirtektar, er ta› besta vit kunnu gera at fara út á arbei›splássini at grei›a frá, hvussu hetta kann fyribyrgjast, sigur hon.

Er ska›in hendur, kann hesin vi›ger›ast vi› massagu, hita og ultraljó›i›, men talan kann eisini gerast um varandi mein, um einki ver›ur gjørt vi› hetta. Tí eru bestu rá›ini at gera naka› til tess at fyribyrgja ska›anum, sigur Beinta enn einafer›, á›renn vit takka fyri samrø›una.

Ta› er orsaka› av nógvu smáu rørslunum í fingrunum, at músaska›in av fyrstan tí› byrjar at gera um seg

Mynd: Jens Kr. Vang

Tjaldrið sleipaði tangaskip

Fyrrapartin í gjár kom Tjaldrið á Havnina við einum uppsteðgaðum tangaskipi

Norska tangaskipið West Streamer, sum var á veg úr Íslandi niður á europeiska meginlandið, fekk maskinskaða suður úr Føroyum.

Tjaldrið fór til skipið og sleipaði tað til Havnar. Skipini komu á Havnina fyrrapartin í gjár, og West Streamer skuldi fáa skaðan umvældan á Tórshavnar Skipasmiðju, verður upplýst av Vaktar- og Bjargingartænastuni.

West Streamer er kemikaliutangaskip, sum hevði verið í Íslandi og lastað fiskaolju, sum, eftir hvat Vaktar- og Bjargingartænastan hevði skilt, skuldi til Pólands.

ej

Tjaldrið kom fyrrapartin í gjár á Havnina við norska kemikaliutangaskipinum West Streamer
Mynd: Jens K. Vang

Lat verða sum er

Hóast onkur hevur nevnt, at felagssangurin á ólavsøku kanska átti at verðið broyttur, eru fólk samd, at best er, sum er

Hvat heldur tú um midnáttarsangin á ólavsøku?
Skal hann broytast, ella skal hann vera, sum er?

Elsa Thomsen
Hoyvík:

Hatta er ein tradition, sum er komin fyri at vera. Tað er eingin ivi um tað. Og tað verður ótrúliga ringt at gera nakrar broytingar í tí, um nakar annars er, sum ynskir tað.

Hatta er eitt rættiliga áhugavert tiltak, har hvør syngur við sínum nevi, og tað er rættiliga charmerandi. Eg haldi tað vera sera stuttligt at hoyra fólk bara syngja av hjarta. Hart og spakuliga. Væl og pípandi falskt, hvørt um annað. Tað er ein fólkaligur hugni í tí. Fólk vilja vera við, og tað er væl tað, endamálið er.

Tó eitt hjartasuff havi eg kortini, og tað er í samband við heftini, sum brúkt verða.

Í fyrsta lagi haldi eg ikki, at tað er neyðugt við heftum, tí flestu fólk duga helst sangirnar, sungnir verða, uttanat. Men tá nú hefti verða brúkt, hevði tað verið gott, um sungið var úr enda í annan. Byrjað við nummar eitt og so hildið fram til tann seinasta. Sum er, kann tað væl henda, at fólk ikki fáa við, hvat nummar sungið verður, tá lopið verður aftur og fram. Og so missa tey tráðin.

Hatta tiltakið er nakað, sum fólk síggja fram til og gleða seg til hvørja ólavsøku.



Finn Gærdbo
Vági:

Eg haldi, at hatta er eitt fínt, sum tað er. Tað má ikki gerast nakað við hatta, tí tað er so populert, sum tað er, at hatta eiga vit at varðveita í verandi líki. Hatta samlar so nógv fólk, at hatta má vera verðandi.

Zacharias Hammer
Norðdepli:

Hatta er ikki ein spurningur, tú setir fólki. Sjálvandi skal sangurin vera, sum hann er. Hann er stutt og greitt komin fyri at verða. Akkurát, sum hann er.

Midnáttarsangurin er vorðin fólkaogn, sum fólk hevur tikið til sín. Og tað, sum fólk taka til sín, fer altíð at yvirliva, og tí kann hann ikki broytast.

Pól á Kletti
Tórshavn:

Eg haldi, at sangurin á midnátt skal vera, sum hann er. Tað byrjaði sum eitt avmarkað forum uttan fyri hjá Hjalmari Jacobsen í síni tíð. Nú hevur tað ment seg til eitt samlingspunkt, sum avgjørt eigur at vera, sum tað er. Handan løtan er í hvussu er mín besta løta á ólavsøku.



Jens Jensen
Tjørnuvík:

Tiltakið er frálíkt. Høvuðsendamálið er, at fólk koma saman at syngja kendar sangir og fáa fram kensluna av at vera føroyingur. Sangunum í Føroya Fólks kunnu øll taka undir við.

Hatta vísir seg at vera nakað, sum fólk taka undir við, og har er ikki nakað ringt at læra.



Christoffer Ripley
Vági:

Tað er eitt gott tiltak. Hatta er útmerkað, og eigur at vera, sum tað er.

Nú eri eg ikki altíð á ólavsøku, men í fjør vóru konan og eg og sungu, og okkum dámdi tað heilt væl.